**VIÐMERKINGAR**

# Hvussu mikið kostar ein danskur

TÓRBJØRN JACOBSEN,
løgtingsmaður



**Íspunnu morðhóttanirnar móti Bjarna Djurholm vóru bert eitt stuntnummar hjá Fólkaflokkinum at flyta fokus frá donsku fráboðanini til ST. – Harraguð, maðurin hevur ikki so frægt sum verið í grannalagnum. Hevur bara sligið upp á tráðin til eina skrivstovudamu og heitt á hana um at bera boðini víðari um, at hann ætlaði at gera seg inn á Bjarna, sum við hesum idiotiska stuntinum fekk tvær flugur við einum smekki. Fjalt ST fráboðanina í krútroykinum og rationaliserað móttøkuna í Tinganesi, sigur Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður m. a. í hesi speisku viðmerkingini**

Roykur úr rúkandi toftum. Ein føroyskur bumbumaður hevur varpað eitt missil av Bursatanga tvørturígjøgnum eystara húsaveggin í Vinnumálaráðnum. Húsini fara í luftina, og øll tinghellan skelvir í sínari grund. Tey, sum komu livandi frá atsóknini, flaksa íkring í sansaloysi, og ministarin kemur tilsótaður, og tó ísakaldur, undan grefliga mahogniborðinum. Ein partur av B&O-anlegginum lavar eftir øðrum kjafti, eftir tí sum eftir er, av norðara bróstinum, og skápið við Chivas Regal fløskunum og cigarunum, hann plagdi at bjóða kammesjukkunum í samgonguflokkunum, táið hann skuldi trýsta okkurt upp á pláss, eftir egnum høvdi, ella samsvarandi nýliberalu hugsjónini hjá flokkinum, var pulviserað. Edikettin frá einu fløskuni var í granatvarmanum brend inn í húðina á høgra yvirarmi, lík eini tatovering.

Átøkur eini reklamusúlu fyri Rúsuna og skotsku whisky bóndurnar og um somu tíð einum djørvum sersjanti, ið júst hevur tikið seg aftur frá nærdysti við marxistisku gueriljuna, sum hóttir stabilitetin í hesum ófatiliga framkomna landi, tekur hann fartelefonina úr rivnaða reyvalummanum. Nú ræður um at hugsa klárt, hann velur útvarpið, áðrenn hann varskógvar instansirnar í almennari tilbúgving. Maðurin á redaktiónini, líka gjarna slektaður úr Funningi, velur at bróta seg inn í eina annars áhugaverda sending. Stórtíðindi. Eitt missil hevur rakt Sethúsini, gomlu kasjottuna hjá føroyingum, har so frægir menn sum Erlendur Patursson og Fisher Heinesen hava sitið búraðir inni fyri sítt yvirgangsvirksemi. Koreaslaktarin sat eisini har, fyri smugling, rúsevnasølu og spekulatión. Fyrstnevndi varð enntá valdur inn á ting, meðan hann sat buktaður uppi undir tróðrinum og jaglaði gamlar breyðskorpir frá Frantz og kulkaði onkran hendinga vatnsopa í seg, táið fongsulsvaktin, Fríðrikur hjá Garða-Peturi úr Svínoy, legði leiðina framvið. Tjóðin fór í coma. Varrarnar hveptust og dirraðu av ræðslu og øði, tey flestu settu seg, knøini bóru ikki, skjálvtin í liðunum var ov máttmikil, og tárini rullaðu niður eftir kjálkunum hjá øllum, ið vóru so heppin, at tey hoyrdu málið í ministaranum. Eitt ódeyðiligt martyrium var skapt. Djurholm hevði yvirlivað enn eitt attentat.

Hetta man vera myndin, tey flestu síggja fyri sær, eftir at stuntríðurnar, transformeraðar ígjøgnum filtursleysu mikrofonhaldarnar, hava tambað hátalarar og skíggjar, eftir at landsstýrismaðurin í vinnumálum í eina heila og haldgiga viku royndi at skapa sær eitt martyrium, grundfest í einum pástandi um, at hann var blivin drápsmálið hjá onkrum. Annars hevur hann verið merkiliga tigandi, síðani løgmaður gamlaárskvøld boðaði frá gleðiligu stórtíðindunum, at danir nú endaliga høvdu tinglýst føroyska matrikkulin sum hjáland, við ongum tilverurætti, í altjóða samfelagnum, á høvuðsskrivstovuni hjá Sameindum Tjóðum í New York. Táið amerikanskir forsetar hava innanríkispolitiskar trupulleikar, leypa teir konsekvent á annað land við hermegi. Tað ræður um at fjala veruleikan í krútroykinum hinumegin jørðina. Attentatið hjá Bjarna líkist ikki sørt. Maðurin, sum møguliga hevur hótt, er alkendur í politisku skipanini. Hann tosar í telefon við flestu politikkarar dag og dagliga, hetta hevur gingið fyri seg í áravís, og tað tykiskt sum hevur hann ávísa frægd í at teska eina hóttan um bæði eitt og annað burturúr sær. Ongin hevur tikið hetta í álvara. Tað hevur heldur ikki víst seg at vera neyðugt. Tað hendir ongantíð nakað. Ikki fyrrenn nú Fólkaflokkurin hevði tørv á at fjala donsku fráboðanina til ST í krútroykinum frá einum uppspunnum pseudo-attentati ímóti landsstýrismanninum í vinnumálum. Harraguð, maðurin hevur ikki so frægt sum verið í grannalagnum. Hevur bara sligið upp á tráðin til eina skrivstovudamu og heitt á hana um at bera boðini víðari, um at hann ætlaði at gera seg inn á Bjarna, sum við hesum idiotiska stuntinum fekk tvær flugur við einum smekki. Fjalt ST fráboðanina í krútroykinum og rationaliserað móttøkuna í Tinganesi. Ein smartur máti at legitimera sentraliseringina av allari móttøku í Vektarbúðini uttan svørðslag frá starvsfólkunum. Trupult hjá kuliarunum at argumentera ímóti, táið ein drápshóttan fjalir seg onkustaðni ímillum skins og hold. Fjøldin er tó ikki býttari enn so, at tey flestu nú, eftir at attentatið vísti seg at vera ein vátur kinesari, og landsstýrismaðurin av tí sama er vorðin uppaftur meira láturligur, enn fyri stuntið, er farið at spyrja eftir Fólkaflokkinum í sjálvstýrismálinum.

> »Bjarni, sum nú gongur runt og billar sær inn, at nakar hevði tímað at spanderað eina patrón upp á hann…«

Skilagóðir og siðiligir. Sannførdir og greiðir. Álítandi og reiðiligir. Hampamenn teir flestu, hesir sambandsmenninir, sum í flestum førum hava arvað politisku støðuna, sum teir ikki himprast við at gera greiðu fyri uttan at blúgvast. Vit hoyrdu Kaj Leo í lurtinum. Hann legði ikki fingrarnar ímillum, fegnaðist um at Føroyar umsíður vóru skrásettar í altjóða samfelagnum, sum partur av danska eindarstatinum, við dyggari hjálp frá ríkistrællunum báðum - Kallsberg og Eidesgaard. Hitti ein sambandsmann av Strondum nú ein dagin, hann spurdi løgna spurningin, um eg mundi vita, hvussu nógv tað kostaði at produsera ein riddarakross. Skilti ikki djúparu ætlan hansara við spurninginum, og skeyt uppá, at eitt stykki blikkasalat, við bandi og sikkurheitsnál, neyvan mundi kosta meira enn einar 16-18 krónur í leikabúðunum í Keypmannahavn.

Ájú, helt hann fyri, máti skuldi vera við at fara skeivur, men sjálvandi, kostnaðurin varð alt eftir hvørjari bringu krossurin fekst at hanga á. Hvørið fekst inn á kongaliga básin at standa, hvørið av berari og blektari fáfongd og í stórlætisørsku fekst í teknatænastu hjá jarðiska Drotti danska ríkisins. Hann helt fyri, at sjáldan høvdu donsk statsáhugamál fingið so frægan forrentning av eini íløgu, sum hendan dagin, táið drotningin hongdi riddarakrossin í útnyrðingshornið, í kantinum uttanvert hjartalokurnar á Anfinni Kallsberg. Størsta politiska metamorfosa í føroyskari søgu hendi tann dagin. Bjarni, sum nú gongur runt og billar sær inn, at nakar hevði tímað at spandera eina patrón upp á hann, tók hon sjálvandi við í ferðini, eittans av náði og miskunn, fættist frá hóvinum. Eitt totalt tjóðskaparligt yvirgevilsi. Danir fingu eina heila tjóð afturfyri tveir riddarakrossar, og nú er danska ognin tinglýst í Sameindum Tjóðum.

Froðin hevur flákrað upp frá politiska retorikkinum, síðani stakkaladýrið av einum donskum ríkistrælli, Føroya løgmaður, boðaði frá stórhendingini. Stríðið kom at standa ímillum Jóannes og Høgna. Javnaðar- & Tjóðveldisflokkin. Í tjaksending eftir tjaksending. Í greinum og samrøðum. Ongin gjørdist meira vitandi av hesum, táið kamphanarnir fyri tað mesta stóðu og róptu í holið á hvørøðrum. Tosaðu framvið hvørøðrum. Royndu av øllum alvi at frelsa hvønnannan politiskt, hóast 180 stig eru ímillum sjónarmiðini á ríkisrættarliga feltinum. Eftirhondini er Jóannes vorðin líka so ærligur sum Kaj Leo, staðfestir at fráboðanin hjá dønum, sambært hansara hugsan, ikki er annað enn ein reel niðurstøða um ríkis- & fólkarættarligu viðurskifti føroyinga, soleiðis sum tey eru skipað í dag. Hann sættast eftir øllum at døma við støðuna. Hann og veljarar hansara dáma hendan danska stórpolitikkin okkara vegna, stórtrívast í hesum, og ongin orsøk er at halda annað um Javnaðarflokkin, ið frá føðingini ikki hevur verið annað enn ein socialdemokratiskur ramur sambandsflokkur og heldur ongantíð verður nakað annað. Tað røkiskt ikki fyri, at hann hættar sær



*– Riddarakrossarnir, hasi donsku leikapettini, gjørdust føroyingum eitt dýrt fornoyilsi. Ein heil tjóð rillar av hesum imperialistiska bringuprýði, hetta má fáa avleiðingar, og teimum ræður einans fólkið fyri, táið Jóannes um skamma stund fer at leggja kongin. Politiskt vacuum fremur onki. Dregur bara frá í mun til heimin annars. Stundin er komin til politiskt systemskiftið. At royta donsku tinglýsingina útaftur úr arkivunum í ST stjórnarskrivstovunum, fyri síðani at boða*